# Skaðanevnd má kanna ferðsluvanlukkurnar

**– Nú er upp á tíðina at seta niður eina ferðsluskaðanevnd, soleiðis at veruligu orsøkirnar til óhapp og vanlukkur í ferðsluni kunnu finnast, sigur Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sum vísir á, at fýra fólk eru deyð í ferðsluni fyrstu tveir mánaðirnar í ár**




*– Tá vanlukka hendir á sjónum, verður kanning gjørd, sjóforhoyr hildið og frágreiðing skrivað. Men tá ið ferðsluvanlukkur henda, verða tær ikki kannaðar út í æsir, soleiðis sum gjørt verður í grannalondum okkara, sigur Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd*

*(Tilvildarlig mynd)*

FERÐSLA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Forkvinnan í Ráðnu fyri Ferðslutrygd heitir nú á myndugleikarnar um at eina ferðsluskaðanevnd, sum kann kanna ferðsluóhapp og finna fram til veruligu orsøkirnar til óhapp og vanlukkur.

– Tá vanlukka hendir á sjónum, verður kanning gjørd, sjóforhoyr hildið og frágreiðing skrivað. Men tá ið ferðsluvanlukkur henda, verða tær ikki kannaðar út í æsir, soleiðis sum gjørt verður í grannalondum okkara, sigur Rúna Sivertsen í eini viðmerking í blaðnum í dag.

### Lutvíst fleiri doyggja

– Løgmaður hevur sagt, at Føroyar um stutta tíð skal verða heimsins mest framkomna land. Hetta ljóðar mikið gott, og mítt inniliga ynski er, at tað skal gangast okkum eftir ynski løgmans. Men tá tað kemur til ferðsluna, kunnu vit ikka siga annað, enn at Føroyar eru eitt tilafturskomið land.

Rúna Sivertsen vísir á, lutvíst fleiri fólk doyggja í ferðsluni í Føroyum enn í okkara grannalondum.

– Teir 49 dagarnar, sum higatil eru farnir av hesum árinum, hava vit mist fýra mannalív í ferðsluni. Hetta kunnu vit ikki tigandi hyggja at og góðtaka, sigur hon.

### Ongan ferðslupolitikk

Rúna Sivertsen heldur, at tú er tíðin komin at seta niður eina ferðsluskaðanevnd, soleiðis at veruligu orsøkirnar til óhapp og vanlukkur í ferðsluni kunnu finnast.

– Føroyar er einasta land í Norðanlondum, sum ongan ferðslupolitikk hevur. Hetta undrast hini londini stórliga á, ikki minst tá tey síggja, hvussu nógvar álvarsligar vanlukkur henda hjá okkum, sigur hon.

– Tað er flóvisligt at umboða Føroyar á norðurlendsku fundunum og noyðast at viðganga, at enn hevur politiski myndugleikin ikki fingið í lag at samtykkja ein ferðslupolitikk fyri Føroyar, sigur Rúna Sivertsen.

# Skúlin skal verða roykfríur

**Hósdagin høvdu skúlarnir í Klaksvík stórt tiltak um royking, og kanningar vísa, at færri og færri skúlanæmingar í Klaksvík roykja. Málið er, at skúlabørn als ikki skulu roykja**



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, setti tiltakið, sum Rani Nolsøe, formaður fyri Heilsu og umhvørvisnevndina hjá Klaksvíkar kommunu og umboð frá skúlunum høvdu skipað fyri*
*Mynd: Norðlýsið*

ROYKING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Málið hjá okkum er at gera skúlin púra roykfrían. Tað sigur Rani Nolsøe, formaður í Heilsu og Umhvørvisnevndini hjá Klaksvíkar kommunu, sum saman við skúlunum skipaði fyri serliga roykiátakinum hósdagin.

– Vit hava havt afturvendandi átøk um royking, og vit fara at halda fram við tí. Vit hava gjørt kanningar av roykivanunum hjá skúlabørnunum síðstu árini, og tað vísir seg, at alt færri børn roykja, sigur Rani Nolsøe.

– Orsøkin til tað er bæði, at fleiri børn als ikki byrja at roykja, og eisini at summi leggja av at roykja. Málið er, at eingin skúlabørn í Klaksvík skulu roykja.

### Skreytbløð til tey roykfríu

Tiltakið, sum kallaðist «Roykfríur skúli« var í KFUM & K í Klaksvík, og har var ymiskt á skránni.

Landsstýrismaðurin Hans Pauli Strøm setti tiltakið, Jákup Veyhe avdúkaði eina nýggja plakat, sum Edward Fuglø hevur gjørt. Vinnarin av Nósabarnaprixnum sang fyri næmingunum, skreytbløð vórðu latin til teir roykfríu flokkarnar, og vinnarin av yrkingakapping varð avdúkaður.

Allir næmingar úr sætta til tíggjunda flokk vóru við til tiltakið.

## Meira skræpa í Gøtu

Ein nýggj konsert undir heitinum »Skræpa« verður hildin í Losjuni í Gøtu leygarkvøldið.

Heitið á konsertini er komið av, at hetta eru bólkar, sum ikki sluppu við til Prix Føroyar, men hesaferð verða tað lutvíst bólkar, sum longu hava verið við í kappingini, men sum ikki komu víðari. Harafturat er eisini ein bólkur, sum skal spæla í næsta umfarinum av Prixnum.

Fýra bólkar fara at spæla. Teir eru Frostbit, Dimmi, Paradox og Sic. Konsertin verður leygarkvøldið kl. 22.00

**ek**

## Skótar halda serligan dag

Leygardagin verður ein serligur dagur fyri allar skótar.

22. febr. verður nevniliga nevndur altjóða hugsunardagur og verður hildin um allan heim. Skótar savnast og hugsa um Lord Baden-Powell, sum stovnaði skótarørsluna, og konu hansara, sum bæði høvdu føðingardag 22. febrr. Hetta verður gjørt við at minna hvønn annan á skótalógina, og at ein sum skóti er vinur við allar aðrar skótar óansæð húðarlit ella trúgv.

Í Føroyum verður dagurin hildin við skótagudstænastu kring landið. Skótar úr Havn og av Argjum fara í Havnar kirkju, skótar úr Leirvík, Fuglafirði og av Glyvrum fara í kirkju á Glyvrum, skótar úr Hvalvík, Kvívík, Miðvági og Kollafirði fara í kirkju í Kollafirði og skótarnir í Klaksvík fara í Christianskirkjuna. í summum bygdum fara skótarnir í kirkju sunnudagin í staðin.

Í Føroyum eru 27 skótabólkar og 1600 skótar tilsamans. Í heiminum eru meiri enn 25 millliónir skótar í 160 londum.

**ek**

## Tobbi var í uppskoti

Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, »misti« ikki sessin sum næstformaður í Tjóðveldisflokkinum mitt í stríðnum við formannin, sum vit skrivaðu í blaðnum í gjár. Torbjørn Jacobsen segði sessin frá sær, og tá hann saman við Karsten Hansen varð skotin upp at verða næstformaður, tapti hann atkvøðugreiðsluna á eykaflokstinginum.

**Blaðm.**